Lítil futtur í íslendingum

***HM undankapping**: Allan Simonsen heldur, at fótbóltsliga avrikið hjá føroyingum ímóti Danmark var meiri sannførandi enn tað hjá íslendingum*

Allan Simonsen, landsliðsvenjari, ætlaði upprunaliga at hava tvær vennjingar leygardagin. Men eftir venjingina fríggjakvøldið var avrátt, at tað bara skuldi venjast leygarmorgunin klokkan ellivu. Hópurin var eitt sindur tyngdur, tí Todi Jónssn hevði fingið ein løst í lærið, og John Petersen hevði tað heldur ikki ov gott í øðrum knænum.

Leygarkvøldið var landsliðið á Svangaskarði, har teir ótu døgurða og hugdu at dystinum ímillum Ísland og Danmark. Eingin ivi var um, hvørjum Allan Simonsen tók á við, men millum spælararnar vóru kenslurnar ymiskar. Summir tóku á við Danmark, og um í hvussu so er teir, sum spæla í Íslandi, tóku á við grannum okkara fyri vestan, so var tað ikki so undarligt.

Danmark vann 2–1. Morten Olsen og hansara menn vóru lættir um hjarta. Teir høvdu roknað við, at uppgávan fór at verða torfør, og tað stóð eitt sindur á síðstu løtuna, men eingin ivi var um, at sigurin var uppiborin. Íslendingar spældu ikki væl, og Allan Simonsen hevði góðar møguleikar at sammeta avrikini hjá Føroyum og Íslandi ímóti Danmark.

– Íslendingar eru frammanfyri okkum á altjóða listanum. Leygarkvøldið hevði eg saman við spælarunum ein fínan møguleika at staðfesta, at teir spæla ikki betri fótbólt, enn vit gera. Okkara fótbóltsspæl hekk betri saman ímóti Danmark, enn teirra gjørdi.

Hví eru teir so frammanfyri Føroyar á altjóða listanum?

– Tað er ein sera áhugaverdur spurningur. Tað snýr seg um royndir og álit á egnum evnum. Íslendingar hava fleiri ferðir vunnið og spælt javnt ímóti teimum stóru. Teir eru ikki nøgdir við at tapa tepurt ímóti t. d. Frakklandi og Russlandi. Tað er hugburður, sum ger munin. Nú fingu vit eitt gott úrslit ímóti Slovenia. Men vit mugu ikki verða nøgdir fyrrenn vit vinna, heldur Allan Simonsen.

Fyrrverandi danski landsliðsmaðurin heldur, at tað væl kann hugsast, at onnur lið í bólkinum hjá Danmark fara at missa stig á Laugardalsvøllinum.

Næstu ferð skal Danmark spæla ímóti Norðurírlandi. Tað var um reppið, at norðurírar heilkiksaðu á heimavølli. Teir vunnu 1–0 ímóti Malta. Innskifti Phil Gray skoraði, tá 20 minuttir vóru eftir. Malta var óheppið ikki at koma á odda longu í 4. minutti. George Mallias sendi í stólpan og aftur í málteigin.

Kekkia vann 1–0 í Bulgaria, og teir mugu saman við Danmark metast sum greiðir favorittar í bólkinum.

JH

Farvæl til FCK

Ein miðvallari fór mánadagin úr felagnum hjá Toda og til OB

Hurðin inn og út úr FCK gongur títt. Vit hava síðstu vikurnar skrivað, at felagið hevur keypt tríggjar spælarar. Tað hevur leingi ligið í luftini, at teir eisini ætlaðu at selja, og nú er fyrsti fuglurin flogin.

Talan er um miðvallaran Carsten Hemmingsen. Hann er 29 ára gamal, og hann hevur síðstu vikurnar havt ilt við at vinna sær pláss á liðnum. Carsten Hemmingsen hevur ikki dult, at hann hevur droymt um at sleppa til bretskan fótbólt. Hann royndarvandi í síðstu viku í Dundee United. Men tá einki spurdist burturúr, tók hann av einum tilboði frá OB, har hann spældi fram til 1996.

Kim Brinck, sum Carsten Hemmingsen hevur havt til venjara bæði í OB og FCK, er nú stjóri í OB. Fyrrverandi FCK miðvallarin eigur ein beiggja, sum altið hevur spælt og framvegis spælir í OB. Hann eitur Michael Hemmingsen. Hann er 32 ára gamal. Leygardagin var OB verjuspælarin í Íslandi við Morteni Olsen, Michael Laudrup og teimum. Hetta var fyrsta ferðin, at hann var í landsliðsferðalagnum.

JH

Norðmenn vóru vónsviknir

Finnlendingar og sviar fingu fult, meðan Andorra og Liktinstein taptu tepurt

Í Noregi hevur fótbóltslagið ikki verið nakað serligt í hesi vikuni. Noreg hevur staðið seg avbera væl í undanfarnu undankappingum. Hesa ferð megnaðu teir bara málleysan javnleik á Ullevål ímóti Armenia, sum ikki hevur verið roknað fyri nakað serligt.

Armenararnir togaðu í bremsuna allan 1. hálvleik, og norðmenn dúraðu. Í 2. hálvleiki megnaði heimaliðið at trýsta á naglan, men teir komu ikki nærri enn at stúta við síðuna av.

Í Svøríki var lagið gott. Teir fingu trý stig í torføra dystinum ímóti Aserbadjan. Miðvallarin Anders Svensson úr Elfsborg, sum óvæntað var millum teir fyrstu ellivu, sendi longu í 9. minutti eitt langskot upp undir nettakið. Í 2. hálvleiki vóru sviar kroystir aftur á vøllin, men teir komu undan við øllum stigunum.

Finnland vann á heimavølli 2–1 á Albania. Jari Litmanen, sum er ónøgdur í Barcelona, har hann er lítið á vøllinum, legði heimaliðið á odda stutt undan steðginum. Miðskeiðis í 2. hálvleiki fingu finnar vátan vøtt, tá Edvin Murati javnaði fyri Albania. Skelkurin stóð bara við í fýra minuttir. So skoraði innskifti Aki Rihilahti, sum spælir í norska Vålarenga, sigursmálið eftir hornaspark.

Finnar vóru bara tíggju síðstu 20 minuttirnar. Janne Saarinen fekk í tveir minuttir tvey gul kort og noyddist tískil at fara av vøllinum. Albanararnir trýstu, men teir komu ikki nærri máli enn skoti beint omanfyri tvørtræið.

Tey smáu

Umframt Føroyar vóru tað onkur onnur av teimum smáu í Europa, sum fingu stig í vikuskiftinum. Ivaleyst var føroyska stigið tað mest óvæntaða, men Andorra var um reppið at fáa stig. Høvdu teir megnað tað, so hevði talan verið um uppaftur størri søgu.

Andorra hevur ongantíð fingið stig í einari undankapping. Í vikuskiftinum taptu teir 3–2 á heimavølli ímóti Kypros, sum eisini verður roknað millum tey smáu. Tað var tætt við, at tað fyri fyrstu ferð skuldi eydnast hjá Andorra. Tað var farið ein minutt út um vanligu leiktíðina, tá Michael Constantinou skoraði sigursmálið. 1000 vónbrotnir heimamenn fóru til hús.

Í føroyska bólkinum, bólki 1, stríddist Luksemburg á heimavølli ímóti Jugoslavia. Longu í 4. minutti sóu teir 3.305 áskoðararnar á Josy Barthel stadion Savo Milosevic, sum hevur skoraað ímóti føroyingum fleiri ferðir, seta hol á fyri Jugoslavia. Miðskeiðis í 1. hálvleiki økti Slavisa Jokanovic. Luksemburg megnaði ikki – sum føroyingar megnaðu ímóti Slovenia – at koma afturíaftur og taka tvey mála leiðsluna aftur.

Ísrael, sum hevur Richard Møller Nielsen við róðrið, telist ikki ímillum tær størstu fótbóltstjóðirnar í Europa (teir vilja fegnir og verða roknaðir sum europearar í fótbóltshøpi). Hesa ferð høvdu teir vitjan av Liktinstein, sum Føroyar vunnu 1–0 ímóti á útivølli 26. apríl. Ísrael skoraði beinanvegin, men teir megnaáðu ongantíð at binda um. Liktinstein hevði møguleikar at javna, men í síðstu løtu varð sigurin staðfestur til 2–0.

JH

Todi er ivasamur

Feløgini hjá øllum teimum føroysku landsliðsspælarunum í Danmark spæla í kvøld landskappingardystir á heimavølli

Í kvøld klokkan seks føroyska tíð skulu feløgini hjá føroysku landsliðsmonnunum í Danmark aftur í eldin. Felags fyri AGF, FCK og Herfølge er, at tey skulu spæla á heimavølli. AGF tekur ímóti Lyngby, Herfølge fær vitjan av Silkeborg, og í Parkini verður grannauppgerð millum FCK og AB.

Jákup Mikkelsen skal verja málið hjá Herfølge. Óli Johannesen verður í hópinum hjá AGF. Um hann verður á liðnum var ikki greitt, tá vit frættu.

Hvussu tað verður hjá Toda Jónsson var meiri ivasamt í gjár. Todi fekk ein løst í lærið undir skotvenjing á Svangaskarði fríggjakvøldið. Leygardagin vandi hann ikki saman við hinum, og tað var sera ivasamt, um hann fór at verða førur fyri at spæla sunnudagin.

Mannagongdin í sambandi við landsdystir er tann, at liðini skulu almannakunngerast trý korter undan dystarbyrjan. Dómaraseðilin hjá føroyska liðnum var skrivaður, áðrenn teir fóru úr Runavík og út á Svangaskarð. Men reglurnar úti fyri nummar tíggju og fimtan stóðu tómar. Á Svangaskarði varð Todi testaður, og beint frammanundan klokkan 14.15 avgjørdi Todi sjálvur, at hann skuldi spæla, og so fekk Kurt Mørkøre troyggjuna við fimtan talinum á.

Á avrikinum hjá Toda sást í 1. hálvleiki einki til, at hann var plágaður av skaða. Tíggju minuttir eftir steðgin bað hann eftir ein spurt um at verða skiftur út. Tá var vøddaskaðin í lærinum aftur farin at gera um seg.

Todi og hinir landsliðsmenninir, sum spæla í Danmark og Noregi, fóru úr Vágum fyrrapartin mánadagin. Todi hevur síðani verið í FCK, men tá vit frættu í gjár var ikki greitt, um hann verður førur fyri at spæla í kvøld.

Umframt AGF–Lyngby, FCK–AB og Herfølge–Silkeborg eru tríggir aðrir dystir á skránni í Danmark í kvøld: Brøndby–Viborg, FCM–Haderslev og OB–AaB.

jh

Støðan í HM-undankappingini

Bólkur 1

	d	v	j	t	fyri	ímóti	stig
Jugoslavia	1	1	0	0	2	0	3
Russland	1	1	0	0	1	0	3
Føroyar	1	0	1	0	2	2	1
Slovenia	1	0	1	0	2	2	1
Sveis	1	0	0	1	0	1	0
Luksemburg	1	0	0	1	2	2	0

Bólkur 2

	d	v	j	t	fyri	ímóti	stig
Portugal	1	1	0	0	3	1	3
Kypern	1	1	0	0	3	2	3
Estland	2	1	0	1	2	3	3
Holland	1	0	1	0	2	2	1
Írland	1	0	1	0	2	2	1
Andorra	2	0	0	2	2	4	0

Bólkur 3

	d	v	j	t	fyri	ímóti	stig
Danmark	1	1	0	0	2	1	3
Norðurírland	1	1	0	0	1	0	3
Kekkia	1	1	0	0	1	0	3
Ísland	1	0	0	1	1	2	0
Malta	1	0	0	1	0	1	0
Bulgaria	1	0	0	1	0	1	0

Bólkur 4

	d	v	j	t	fyri	ímóti	stig
Turkaland	1	1	0	0	2	0	3
Slovakia	1	1	0	0	2	0	3
Svøríki	1	1	0	0	1	0	3
Aserbadjan	1	0	0	1	0	1	0
Moldova	1	0	0	1	0	2	0
Makedonia	1	0	0	1	0	2	0

Bólkur 5

	d	v	j	t	fyri	ímóti	stig
Póland	1	1	0	0	3	1	3
Hvítarussland	1	1	0	0	2	1	3
Noreg	1	0	1	0	0	0	1
Armenia	1	0	1	0	0	0	1
Wales	1	0	0	1	1	2	0
Ukraina	1	0	0	1	1	3	0

Úrslit og komandi dystir

Bólkur 1
Úrslit

02-09-00	Sveis-Russland	0-1
03-09-00	Føroyar-Slovenia	2-2
03-09-00	Luksemburg-Jugoslavia	0-2

Komandi dystir

07-10-00	Luksemburg-Slovenia
07-10-00	Jugoslavia-Russland
07-10-00	Sveis-Føroyar
11-10-00	Russland-Luksemburg
11-10-00	Slovenia-Sveis
11-10-00	Jugoslavia-Føroyar
24-03-01	Jugoslavia-Sveis
24-03-01	Russland-Slovenia
24-03-01	Luksemburg-Føroyar
28-03-01	Russland-Føroyar
28-03-01	Sveis-Luksemburg
28-03-01	Slovenia-Jugoslavia
02-06-01	Russland-Jugoslavia
02-06-01	Føroyar-Sveis
02-06-01	Slovenia-Luksemburg
06-06-01	Sveis-Slovenia
06-06-01	Luksemburg-Russland
06-06-01	Føroyar-Jugoslavia
01-09-01	Sveis-Jugoslavia
01-09-01	Slovenia-Russland
01-09-01	Føroyar-Luksemburg
05-09-01	Jugoslavia-Slovenia
05-09-01	Luksemburg-Sveis
05-09-01	Føroyar-Russland
06-10-01	Jugoslavia-Luksemburg
06-10-01	Russland-Sveis
06-10-01	Slovenia-Føroayr

Bólkur 2
Úrslit

16-08-00	Estland-Andorra	1-0
02-09-00	Andorra-Kypern	2-3
02-09-00	Holland-Írland	2-2
03-09-00	Estland-Portugal	1-3

Komandi dystir

07-10-00	Portugal-Írland
07-10-00	Andorra-Estland
07-10-00	Kypern-Holland
11-10-00	Ireland Republic-Estland
11-10-00	Holland-Portugal
15-11-00	Kypern-Andorra
14-02-01	Portugal-Andorra
24-03-01	Andorra-Holland
24-03-01	Kypern-Ireland Republic
28-03-01	Portugal-Holland
28-03-01	Kypern-Estland
28-03-00	Andorra-Ireland Republic
25-04-01	Holland-Kypern
25-04-01	Ireland Republic-Andorra
02-06-01	Ireland Republic-Portugal
02-06-01	Estland-Holland
06-06-01	Estland-Ireland Republic
06-06-01	Portugal-Kypern
15-08-01	Estland-Kypern
01-09-01	Andorra-Portugal
01-09-01	Ireland Republic-Holland
05-09-01	Holland-Estland
05-09-01	Kypern-Portugal
06-10-01	Holland-Andorra
06-10-01	Portugal-Estland
06-10-01	Ireland Republic-Kypern

Bólkur 3
Úrslit

02-09-00	Norðurírland-Malta	1-0
02-09-00	Ísland-Danmark	2-1
02-09-00	Bulgaria-Kekkia	0-1

Komandi dystir

07-10-00	Bulgaria-Malta
07-10-00	Norðurírland-Danmark
07-10-00	Kekkia-Ísland
11-10-00	Ísland-Norðurírland
11-10-00	Danmark-Bulgaria
11-10-00	Malta-Kekkia
24-03-01	Norðurírlandvs- Kekkia
25-03-01	Bulgaria-Ísland
25-03-01	Malta-Danmark
28-03-01	Kekkia-Danmark
28-03-01	Bulgaria-Norðurírland
25-04-01	Malta-Ísland
02-06-01	Ísland-Malta
02-06-01	Norðurírlandvs- Bulgaria
02-06-01	Danmark-Kekkia
06-06-01	Ísland-Bulgaria
06-06-01	Danmark-Malta
06-06-01	Kekkia-Norðurírland
01-09-01	Ísland-Kekkia
01-09-01	Malta-Bulgaria
01-09-01	Danmark-Norðurírland
05-09-01	Kekkia-Malta
05-09-01	Bulgaria-Danmark
05-09-01	Norðurírlandvs- Ísland
06-10-01	Kekkia-Bulgaria
06-10-01	Danmark-Ísland
06-10-01	Malta-Norðurírland

Bólkur 4
Úrslit

02-09-00	Turkaland-Moldova	2-0
02-09-00	Aserbadjan-Svøríki	0-1
03-09-00	Slovakia-Makedonia	2-0

Komandi dystir

07-10-00	Makedonia-Aserbadjan
07-10-00	Svøríki-Turkaland
07-10-00	Moldova-Slovakia
11-10-00	Slovakia-Svøríki
11-10-00	Aserbadjan-Turkaland
11-10-00	Moldova-Makedonia
24-03-01	Svøríki-Makedonia
24-03-01	Turkaland-Slovakia
24-03-01	Aserbadjan-Moldova
28-03-01	Moldova-Svøríki
28-03-01	Slovakia-Aserbadjan
28-03-01	Makedonia-Turkaland
02-06-01	Turkaland-Aserbadjan
02-06-01	Makedonia-Moldova
02-06-01	Svøríki-Slovakia
06-06-01	Turkaland-Makedonia
06-06-01	Svøríki-Moldova
06-06-01	Aserbadjan-Slovakia
01-09-01	Makedonia-Svøríki
01-09-01	Moldova-Aserbadjan
01-09-01	Slovakia-Turkaland
05-09-01	Turkaland-Svøríki
05-09-01	Slovakia-Moldova
05-09-01	Aserbadjan-Makedonia
07-10-01	Makedonia-Slovakia
07-10-01	Moldova-Turkaland
07-10-01	Svøríki-Aserbadjan

Bólkur 5
Úrslit

02-09-00	Noreg-Armenia	0-0
02-09-00	Hvítarussland-Wales	2-1
02-09-00	Ukraina-Póland	1-3

Komandi dystir

07-10-00	Wales-Noreg
07-10-00	Armenia-Ukraina
07-10-00	Póland-Hvítarussland
11-10-00	Póland-Wales
11-10-00	Noreg-Ukraina
11-10-00	Hvítarussland-Armenia
24-03-01	Ukraina-Hvítarussland
24-03-01	Noreg-Póland
24-03-01	Armenia-Wales
28-03-01	Póland-Armenia
28-03-01	Wales-Ukraina
28-03-01	Hvítarussland-Noreg
02-06-01	Armenia-Hvítarussland
02-06-01	Wales-Póland
02-06-01	Ukraina-Noreg
06-06-01	Noreg-Hvítarussland
06-06-01	Ukraina-Wales
06-06-01	Armenia-Póland
01-09-01	Hvítarussland-Ukraina
01-09-01	Wales-Armenia
01-09-01	Póland-Noreg
05-09-01	Ukraina-Armenia
05-09-01	Hvítarussland-Póland
05-09-01	Noreg-Wales
06-10-01	Wales-Hvítarussland
06-10-01	Armenia-Noreg
06-10-01	Póland-Ukraina

Bólkur 6
Úrslit

02-09-00	Letlan-Skotland	0-1
02-09-00	Belgia-Kroatia	0-0

Komandi dystir

07-10-00	Letland-Belgia
07-10-00	San Marino-Skotland
11-10-00	Kroatia-Skotland
15-11-00	San Marino-Letland
14-02-01	Belgia-San Marino
24-03-01	Kroatia-Letland
24-03-01	Skotland-Belgia
28-03-01	Skotland-San Marino
25-04-01	Letland-San Marino
02-06-01	Kroatia-San Marino
02-06-01	Belgia-Letland
06-06-01	Letland-Kroatia
06-06-01	San Marino-Belgia
01-09-01	Skotland-Kroatia
05-09-01	San Marino-Kroatia
05-09-01	Belgia-Skotland
06-10-01	Kroatia-Belgia
06-10-01	Skotland-Letland

Bólkur 7
Úrslit

02-09-00	Bosnia-Hersegovina-Spania	1-2
03-09-00	Ísrael-Liktinstein	2-0

Komandi dystir

07-10-00	Liktinstein-Eysturríki
07-10-00	Spania-Ísrael
11-10-00	Ísrael-Bosnia-Hersegovina
11-10-00	Eysturríki-Spania
24-03-01	Bosnia-Hersegovina-Eysturríki
24-03-01	Spania-Liktinstein
28-03-01	Liktinstein-Bosnia-Hersegovina
28-03-01	Eysturríki-Ísrael
25-04-01	Eysturríki-Liktinstein
02-06-01	Spania-Bosnia-Hersegovina
02-06-01	Liktinstein-Israel
06-06-01	Ísrael-Spania
01-09-01	Bosnia-Hersegovina-Ísrael
01-09-01	Spania-Eysturríki
05-09-01	Liktinstein-Spania
05-09-01	Eysturríki-Bosnia-Hersegovina
07-10-01	Ísrael-Eysturríki
07-10-01	Bosnia-Hersegovina-Liktinstein

Bólkur 8
Úrslit

03-09-00	Rumenia-Litava	1-0
03-09-00	Ungarn-Italia	2-2

Komandi dystir

07-10-00	Litava-Georgia
07-10-00	Italia-Rumenia
11-10-00	Litava-Ungarn
11-10-00	Italia-Georgia
24-03-01	Ungarn-Litava
24-03-01	Rumenia-Italia
28-03-01	Georgia-Rumenia
28-03-01	Italia-Litava
02-06-01	Rumenia-Ungarn
02-06-01	Georgia-Italia
06-06-01	Litava-Rumenia
06-06-01	Ungarn-Georgia
01-09-01	Georgia-Ungarn
01-09-01	Litava-Italia
05-09-01	Georgia-Litava
05-09-01	Ungarn-Rumenia
06-10-01	Italia-Ungarn
06-10-01	Rumenia-Georgia

Bólkur 9
Úrslit

02-09-00	Finnland-Albania	2-1
02-09	Týskland-Grikkaland	2-0

Komandi dystir

07-10-00	Grikkaland-Finnland
07-10-00	Ongland-Týskland
11-10-00	Albania-Grikkaland
11-10-00	Finnland-Ongland
24-03-01	Ongland-Finnland
24-03-01	Týskland-Albania
28-03-01	Albania-Ongland
28-03-01	Grikkaland-Týskland
02-06-01	Grikkaland-Albania
02-06-01	Finnland-Týskland
06-06-01	Grikkaland-Ongland
06-06-01	Albania-Týskland
01-09-01	Týskland-Ongland
01-09-01	Albania-Finnland
05-09-01	Ongland-Albania
05-09-01	Finnland-Grikkaland
06-10-01	Týskland-Finnland
06-10-01	Ongland-Grikkaland

Europeisku bólkarnir

Bólkur 6

	d	v	j	t	fyri	ímóti	stig
Skotland	1	1	0	0	1	0	3
Belgia	1	0	1	0	0	0	1
Kroatia	1	0	1	0	0	0	1
San Marino	0	0	0	0	0	0	0
Letland	1	0	0	1	0	1	0

Bólkur 7

	d	v	j	t	fyri	ímóti	stig
Ísrael	1	1	0	0	2	0	3
Spania	1	1	0	0	2	1	3
Eysturríki	0	0	0	0	0	0	0
Bosnia-Hersegovina	1	0	0	1	1	2	0
Liktinstein	1	0	0	1	0	2	0

Bólkur 8

	d	v	j	t	fyri	ímóti	stig
Rumenia	1	1	0	0	1	0	3
Italia	1	0	1	0	2	2	1
Ungarn	1	0	1	0	2	2	1
Georgia	0	0	0	0	0	0	0
Litava	1	0	0	1	0	1	0

Bólkur 9

	d	v	j	t	fyri	ímóti	stig
Jugoslavia	1	1	0	0	2	0	3
Russland	1	1	0	0	2	1	3
Føroyar	0	0	0	0	0	0	0
Slovenia	1	0	0	1	1	2	0
Sveis	1	0	0	1	0	2	0